# Heiðursgáva landsins 2023

verður latin Eilifi Samuelsen, týðara

Eilif Samuelsen er útbúgvin lærari, og virksemi hansara sum týðari tók dik á seg í 2004, tá forlagið Hemlið gav út *Játtanir Augustinusar* eftir Aurelius Augustinus í føroyskari týðing.

Síðan hevur Eilif Samuelsen latið eina langa røð av klassiskum bókmentum í føroyskt mál. Bøkur eftir Aristoteles, Platon, Montaigne, Machiavelli, Løgstrup og Lagerkvist eru millum heimsbókmentirnar, ið Eilif hevur týtt og givið út á egnum forlagi.

Nýggjasta útgávan er týðingin av bókini *Um stutta lívið og onnur rit* eftir stoiska heimspekingin Seneca, sum kom út á føroyskum í mai 2023.

At kunna lesa Platon og Aristoteles á føroyskum er ikki nøkur sjálvfylgja. Tað er ein gáva til okkum øll, og er at takka eldsálini og kappanum Eilifi Samuelsen fyri.

Fyri mentanarligu avrikini fær Eilif Samuelsen
Heiðursgávu landsins 2023.

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna
18. oktober 2023